

# Føroysk ung, Føroyar og útlandið

Erika Anne Hayfield, Ph.D.
University of the Faroe Islands

Um kvalitativa gransking

Um okkara flytimentan

# Kvalitativ gransking

# Kvantitativ gransking

- Máta, generalisera úrslit og gera forsøgnir
- Svarar spurningum sum t.d. hvør, hvussu nógv, hvar og orsaka samanhangir, lýsa svar frammanundan
- T.d. fátækradømi ella flyting



# At gera kvalitativa gransking

- Svarar spurningum um hví, hvussu og hvat (fátækradømi og flytimentanin)
- Fara í dýbdina og fáa frágreiðingar
- Útgangsstøði (Flick, 2002):
  1. Menniskju virka grundað á týdningin, sum ting hava *og*
  2. Týdning stavar frá og verður skapað í sosial interaktión *og*
  3. Týdning verður virka og laga til tá menniskju tulka



# Hvat halda ung um Føroyar sum stað at vaksa upp og hvørjar framtíðarætlanir hava tey?

- 2/3 av føroyingum millum 30-45 hava búð uttanlands
  - Útbúgvingar og arbeiðsørindum
- Umleið helmingurin av teimum, sum eru undir útbúgving koma heim aftur innan nøkur ár
- Hvat liggur til grundar undir okkara flyting?
-  Hvussu samanbera vit við aðrastaðni? Hvat virkar aðrastaðni og hvat virkar hjá okkum?
- Vit skulu vita og ikki gita

# Um kanningina




- 40 samrøður
- Ung í 8. flokk og miðnám
- Lifemaps

# Flytimentan

# Migratión (fólkaflyting)

- Gransking hevur fyrr hugt nógv eftir ávísar faktorar fyri hví fólk flyta t.d. arbeiði, útbúgving (rationellir faktorar)
- Ein flytimentan: “those ideas, practices and cultural artefacts that reinforce the celebration of migration and migrants. This includes beliefs, desire, symbols, myths, celebrations of migration in various media, and material goods” (Ali, 2007: 39)
- Læra at fara

# Flytimentanin

## At flyta fyri mong ein natúrligur partur av lívsleiðini

- Ung jalig um Føroyar sum stað at vaksa upp (frælsi og tryggleika)
- Natúrligur partur av at vaksa til
- Longu sum 14-15 ára gomul siga ung, at tey fara av landinum - allar genturnar og helvtina av dreingjunum (til skips
- Fyri at betrast, læra, mennast, broytast, fáa møguleikar

Sólva: ...eg havi altíð viljað flutt av landinum, ella lisið uttanlanda/

Sólva: ...*eg havi altíð viljað flutt av landinum, ella lisið uttanlanda ...og tað hava allir mínir beiggjar gjørt og tað er bara ordiliga natúrligt fyri meg/*

EAH: *ja/*

Sólva : *eh og logiskt ella soleiðis*

EAH*: mm, tá tú sigur logiskt, hvussu tá?*

SAJ: *ella eg veit ikki, upp á onkran máta bara.. innlýsandi, virkar sum tað rætta at gera, tí at eisini, altso at t.d. tann eini beiggin hjá mær, hann flutti heimaftur, so eg veit at, at tað er ikki sikkurt, at man bara ongantíð kemur heimaftur*

Sólva, 19 ár

EAH: *Hevur tú nakrantíð hugsað um at farið av Landinum?*

Bjørg: *Ongantíð. Ordiliga undarligt, ehh, tí at eg kenni nógv sum hava verið, og nógvar av mínum bestu vinkonum, sum eisini hava verið, men tað hevur  ongantíð tiltrekt meg upp á nakran máta.*

EAH: *Mmm.*

Bjørg: *So at koma til Handaráar at ganga í skúla var nóg stór broyting hjá mær, haldi eg.*

Bjørg: *Nei tað veit Gud, teimum tørvunum havi eg ikki...*

Bjørg, 23 ár

UNIVERSITY OF THE FAROE ISLANDS

# Flytimentan

At flyta kennist neyðugt fyri mong

- Vilja vera anonym – burtur frá sosialt kontrol
- Burtur frá trygdarnetinum
- Taka risiko
- Søkja frælsi – annað slag av frælsi



Ragnar: *Tað er heldur ikki altíð so gott, at tú bara kennir øll, tá tú fert út, og so so heilsar tú, og so bara tú fert oman í MVM ein vanligan dag, so er tað altíð onkur sum tú kennir harbeint ha?*

EAH: *mm*

Ragnar: *Tú fært líka sum ikki bara fara og ikki skula hugsa um nakað, tí tað eru altíð fólk sum tú kennir sum eru allastaðnis ella soleiðis, eg veit ikki*

Ragnar, 18 ár

Julia: *Ja. tað er positivt (at øll kenna øll) í ein nokkso stóran mun, haldi eg, men tú veit, tað kann eisini vera negativt, tí at vissi tú so ger okkurt býtt, tú veit, so so hevur tú nokkso nógv fingið tað rolluna niður á teg, tú veit ha?*
Julia: *Meðan í størri londum, har hevur tú nógv betur tjans at, at akkurát sum, tú veit, byrja av nýggjum ella soleiðis ha?*
EAH: *Ja*
Julia: *...men vissi tú longu hevur fingið eina keðiliga rollu í Føroyum, so er tað eitt sindur ringt at broyta, so skalt tú í hvørt fall vísa ræðuliga nógv av, at tú ikki ert sum tú ert, ella tú veit, ella tú veit, sum tú hevur gjørt ha?*
EAH: *Ja, eg skilji*
Julia: *Sjálvt um tú í ein vissan mun ert tað ha?*
Julia, 18 ár

UNIVERSITY OF THE FAROE ISLANDS

# Niðurstøða

- Ung veksa til í einari mentan, sum promoverar internationala migratión
- Tey hava sterkar kenslur fyri Føroyum, men kenna seg ov avmarkaði
- Hava eitt slag av frælsi, men fyri at vaksa til kenna tey seg noydd at fáa frælsi at royna mørk – har Føroyar hevur ov nógv sosialt kontrol
- At vaksa til inniber at taka risiko, men at flyta er í sær sjálvum ein risiko. Tí er tryggleiki og sosialur kapitalur týðandi – og tað fæst í t.d. Keypmannahavn (Oyrasund)

# Takk fyri ☺

UNIVERSITY OF
THE FAROE ISLANDS

# References


- Ali, S. (2007) "'Go west young man': The culture of migration among muslims in Hyderabad, India", *Journal of ethnic and migration studies*, 33 (1): 37 – 58
- Flick, U. (2002) *An introduction to qualitative research*, London: Sage